# kúlin 70 ár



*Tveir garpar sum fluttu fram røðu undir hátíðarhaldinum í samkomuhøllini í dag. Mikkjal Helmsdal, rektari, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum.*

# Eftirlýsir visjónir fyri Studentaskúlan

**Tað er ørkymlandi, at ongin loysn er í eygsjón viðvíkjandi hølistrupulleikunum hjá Studentaskúlanum í Hoydølum. - Tað hevur størri týdning, at ein avgerð verður tikin, enn hvør avgerð verður tikin, sigur Mikkjal Helmsdal, rektari**

STUDENTASKÚLIN 70
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

70 ára haldið hjá Studentaskúlanum í Hoydølum hevur verið merkt av, at tað higartil hevur verið ógjørligt at finna eina politiska semju viðvíkjandi framtíðar karmum skúlans. Í røðu sínari undir hátíðarhaldinum í gjár, segði Mikkjal Helmsdal, rektari, millum annað:

- Eg haldi eg tali fyri øll her á skúlanum, tá eg sigi við landsstýrismannin og við politisku skipanini sum heild: Sum karmarnir og møguleikarnir hjá okkum eru nú at gera okkara arbeiði til lítar og skapa ta menning í undirvísingini, sum vit ynskja at fremja, hevur tað størri týdning, at ein avgerð verður tikin, enn hvør avgerð verður tikin. Bara avgerðin verður tikin skjótt og fylgd upp við atgerð og neyðugari fígging.

Eisini vísti hann á, at einum nýtist ikki at ganga leingi runt í skúlanum fyri at staðfesta, at bygningarnir eru niðurslitnir, at skúlastovurnar eru ov smáar, at eingi arbeiðspláss eru til lærararnar, at eingi felagsøki eru til næmingarnar at uppihalda sær á, tá teir ikki eru í tíma, at eingi høli eru til bólkarbeiði, ella til tvørfakliga undirvísing í størri holdum, og ongar umstøður til at skipa eina kunningarmiðstøð, t.e. bókasavns og teldumiðstøð, har næmingar kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava atgongd til undirvísingartilfar á prenti og í talgildum formi.

- Hetta má gerast nakað við, og verður tað vónandi innan fyri tey næstu árini, segði rektarin.

Til ber at lesa røðu rektarans á heimasíðuni hjá Sosialinum, www.sosisalurin.fo



## Studentaskúlin fremstu raðfesting

**Sambært Jógvani á Lakjuni, landsstýrismann í mentamálum er ongin ivi um, at hølistrupulleikarnir í Hoydølum hava fremstu raðfesting eftir valið**

STUDENTASKÚLIN 70
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í sambandi við 70 ára haldið í Studentaskúlanum í Hoydølum leygardagin flutti landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, fram røðu. Og sjálvandi nam hann eisini við karmarnar, sum næmingar og starvsfólk skúlans virka undir í gerandisdegnum.

- Uttan mun til, hvussu politiska landslagið fer at síggja út eftir valið, so verður hetta ein av teimum fyrstu uppgávunum, sum landsstýrismaðurin í mentamálum skal taka støðu til, segði hann í røðu sínari.

Landsstýrismaðurin segði eisini, at skúlabygningurin er 42 ára gamal, og hann er fullkomiliga niðurslitin.

- Tað er breið politisk semja um, at tøk skulu takast fyri at betra um umstøðurnar hjá skúlanum, og at fáa hetta gjørt, liggur frammarlaga, segði hann. Eisini greiddi hann frá, at landsstýrið hevur hesi seinastu árini raðfest skúlabygging frammarlaga.

- Vit kunnu fegnast um, at úrslitið er, at fleiri miðnámsskúlar nú verða bygdir eftir átrokandi tørv í áratíggjur. Samtykt er, at nýggjur tekniskur skúli og handilsskúli verður bygdur í Marknagili, tekniski skúli í Klaksvík verður útbygdur, skúladepil verður bygdur í Suðuroy og Fiskivinnuskúli í Vestmanna. So vit kunnu siga, at tá ið tað kemur til miðnámsskúlar, so er í veruleikanum bara eftir at loysa hølistrupulleikarnar hjá hesum skúlanum, segði landsstýrismaðurin.

- Eg kann ikki standa og lova nakað her í dag, men eg taki undir við ynskinum og vónini hjá rektaranum um, at hátíðarhaldið, tá ið skúlin verður 75, kann haldast í glæsiligari hølum, segði Jógvan á Lakjuni í røðu sínari.

Til ber at lesa alla røðu landsstýrismansins á heimasíðuni hjá Sosialinum, www.sosisalurin.fo